HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 2. februar 2017 kl. 16:30

Á fundinum vóru:	Jeanette Blaasvær, Malan Mikkelsen, Petur Mittún, Bjørghild Djurhuus og Manne Persson
Avboð:	Bogi Andreasen
Skrivari:	Hans Jón Thomsen

Skrá

Skúlastjórin kunnaði skúlastýrið um skúlagongdina og skúlabygnaðin í Hoyvíkar skúla, eftir at hann tók við starvinum 17. mars 2016. Skúlabygnaðurin varð lagdur fram fyri starvsfólkum skúlans í Námsfrøðiliga ráðnum tann 30. mars 2016.

Tvey skjøl eru send skúlastýrinum til hoyringar:

- Uppskot frá arbeiðsbólkinum um skúlabygnað fyri miðbýarskúla
  Hoyringsfreist: 1. februar 2017
  Ongar viðmerkingar vóru frá skúlastýrinum í Hoyvíkar skúla.
  Fört varð fram, at hetta var heldur óviðkomandi fyri Hoyvíkar skúla.
- Uppskot til vegleiðing um uppgávur hjá skúlastýrum í Tórshavnar kommunu
  Hoyringsfreist: 6. mars 2017
  Viðgerðin av uppskotinum var útsett til næsta skúlastýrisfund

Ymisk evni/mál, ið skúlastýrið ætlar at arbeiða víðari við:

- Mannagongdir fyri skúlan
- Ferðsluviðurskiftini vestan fyri skúlan við inngongdina á Karlamagnusarbreyt
- Hegnið rundan um sparkivøllin í skúlagarðinum
- Skúlagarðurin
- Spurnarkanning/nøgdsemiskanning millum foreldrini í Hoyvíkar skúla

Fundurin lokin kl. 18:15